## Drúgvari enn væntað

Okkurt bendir á, at NATO og afghanski stjórnarherurin hava undirmett Taliban í sambandi við tað stóra átakið í Helmand-landspartinum har suðuri í Afghanistan. Bretski heryvirmaðurin Nick Carter, sum stendur á odda fyri NATO-deildunum í økinum, sigur við BBC, at tað kann fara at taka NATO og afghanska herinum millum 25 og 30 dagar at taka býin Marjah, sum er høvuðsmálið í átakinum. Nick Carter sigur, at ikki fyrr enn um einar mánaðir fæst at vita, um átakið gekk sum ætlað. Í gjár doyðu fýra NATO-hermenn í bardøgunum. Tveir teirra vóru bretar.



## Iran ger kjarnorkuløðing

Ein frágreiðing hjá Altjóða Kjarnorkustovninum IAEA sigur tað vera sannlíkt, at Iran er í ferð við at gera eina kjarnorkuløðing, og tað hóvar ikki amerikonsku stjórnini. Talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Robert Gibb, sigur við fronsku tíðindastovuna AFP, at frágreiðingin hjá IAEA vísir, at Iran heldur ikki sínar altjóða skyldur. Hann leggur afturat, at áskoðanin hjá USA hevur verið og er, at tað eigur at fáa avleiðingar fyri Iran, um landið brýtur sínar skyldur. Ein amerikanskur embætismaður sigur við AFP, at er tað so, at Iran er í ferð við at gera eina kjarnorkuløðing, kann arbeiðið taka fleiri ár.

# Størsta navnið nakrantíð

**- Tað verður lív í á Vágsbøi, tá Westlife traðkar á pall á Summarfestivalinum. Saman við Scorpions er hetta størsta navnið, sum nakrantíð hevur verið á festivalinum, staðfestir Eirik Biskopstø, fyrireikari**

SUMMARFESTIVALUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*




*Westlife er størsta popnavnið, hevur hevur verið í Føroyum nakrantíð, siga fyrireikararnir at Summarfestivalinum, Steintór Rasmussen og Erik Biskopstø*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað var eitt stórt navn, ið fyrireikararnir til Summarfestivalin í Klaksvík kundu avdúka á tíðindafundi í morgun.

Westlife er navnið, og bólkurin er mest seljandi bólkur seinastu tíggju árini, so tað var ikki uttan stoltleika, at teir báðir, Eirik Biskopstø og Steintór Rasmussen, bóru tíðindini.

- Westlife er ein bólkur, sum verður nógv spældur í Føroyum og sum nógvir føroyingar dáma. Tá ein bólkur er heimskendur, so hevur hann eisini fjepparar um allan heim og tískil eisini í Føroyum, og eg haldi eisini, at Westlife hevur eina serliga sterka støðu her í Føroyum, sigur Steintór Rasmussen, fyriskipari.

Bólkurin hevur selt 45 milliónir fløgur.

- Tað sigur so mikið sum, at bólkurin hevur eina góða vøru, ikki bert í eitt stutt tíðarskeið, men yvir fleiri ár, sigur Steintór Rasmussen.

Tað er eingin verri enn Simon Cowell, ið er upprunamaður til Westlife.

- Tað var jú Brian McFadden, ið var við til at sparka Summarfestivalin í gongd í 2005, og tá spurdu fólk, um tað ikki var eitt hugskot at fáa ta orginalu vøruna hendanvegin. Brian McFadden var jú upprunaliga ein av limunum í Westlife, sigur Steintór Rasmussen.

Og tað var longu tá, at tankin spratt at royna at fáa Westlife til Føroya.

### Í prime-time

Westlife er eftirhondini ein gamal bólkur, og teir hava gjøgnum tíðirnar givið ikki færri enn tíggju fløgur úr.

- Fyrstu ferð eg hoyrdi Westlife var við lagnum »Seasons in the Sun« hjá Terry Jacks, og tá sló tað meg, at bólkurin var so melodiøsur og teir sungu so væl, sigur Steintór Rasmussen.

Westlife er kendur fyri at gera nógv coverløg, men tað hevur fyriskiparin av Summarfestivalinum ongar trupulleikar við.

- Teir gera tað jú væl hvørja ferð, og tað hevur eisini verið teirra stílur, men tað koma eisini nógvir nýggir sangir við Westlife eisini. Vit hava júst hoyrt ein nýggjan sagt her á tíðindafundinum, so teir megna at yvirganga seg sjálvar hvørja ferð, sigur Steintór Rasmussen.

Hann sigur, at tað tíbetur eru so nógv fólk, sum kenna sangir hjá Westlife, og tí er tað so stórt kupp at fáa teir hendan vegin. Men er ein tími ella tveir nóg nógv tíð hjá einum bólki, sum hevur so nógv hitt?

- Ætlanin er, at teir skulu fáa rímiliga góða tíð, og teir fara at spæla leygarkvøldið, kanska frá 10.30 og úteftir. Hvat teir so velja burtur úr rúgvuni, er meira upp til bólkin sjálvan, sigur Steintór Rasmussen.

Fyrireikararnir fara sjálvandi at vera í tøttum samstarvi við bólkin frameftir, men Steintór Rasmussen roknar við, at talan verður um eina samankóking av kendastu løgunum, sum so aftur fara at geva eina góða uppliving.

Besti nakrantíð

Umframt teir fýra limirnar í Westlife koma eisini teir vanligu tónleikararnir, sum spæla undir hjá teimum, við til Føroya.

Bólkurin fekk sítt gjøgnumbrot sum upphitarar fyri Boyzone og Backstreet Boys, men teir eru sjálvandi komnir langan veg síðani tá.

- Teir eru vorðnir minst líka kendir sum teir bólkarnir síðani tá. Tosað verður nógv um Take That, men kanska er Westlife ein líka kendur bólkur, sigur Steintór Rasmussen.

Teir spenna víða, og teir syngja nógvar kendar sangir, so tað eru uttan iva nógv fólk, sum dáma teir.

- Eg rokni við, at fólk millum 20 og 40 dáma og kenna Westlife serstakliga væl, sigur Steintór Rasmussen.

Og ein annar fyriskipari, Erik Biskopstrø, ivast ikki í, at hetta er nakað stórt fyri Summarfestivalin.

- Scorpions er uttan iva størsta navnið innan rocktónleik, sum hevur verið á Summarfestivalinum, men tá tað kemur til pop, er einki at taka seg aftur í, at Westlife er tað størsta, sigur Erik Biskopstrø.

Nú er so bara eftir hjá Westlife fjepparum at brynja seg við toli til august mánaði upprennur.

## Listaskálin fýrati

**Sunnudagin 21. februar 2010 kl. 16.00 verður 40 ára hátíðarhald í Listaskálanum við røðum, 52-manna kórsangi og 16 tónleikarum við hesi skrá**

Formaður Listasavns Føroya, Martin Næs, bjóðar vælkomin.

Formaður Listafelags Føroya, Malan Marnersdóttir, hugleiðir um Listaskálan hesi seinastu 40 árini.

Havnarkórið framførir kórsang av William Heinesen / Vagn Holmboe.

Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, heldur røðu.

Bratsch – variatión William Heinesen / N. Kapnas yvir “Vågn op og slå dine strenge” gl. føroyskt sálmalag.

Havnarkórið framførir Tívils døtur - William Heinesen.

Borgarstjórin, Heðin Mortensen, heldur røðu.

Norskaløva – William Heinesen – Flygel Jóhannes Andreassen.

Havnarkórið framførir Listaskálakantatuna, sum var skrivað av Karsteni Hoydal í 1970. Tónleikurin eftir William Heinesen er bygdur á gomul føroysk løg: “Harra Gud títt dýra navn og æra”, “Blundi, blundi tirla” og “Ljómur”.Tónleikinskrivaði Karl Clausen eftir hugskotum og skitsum hjá Williami Heinesen.

Solistar: Ernst Dalsgarð og Berghild Poulsen.

Okkurt leskiligt verður at fáa.

Øll eru vælkomin.

**LISTASAVN FØROYA**